# Skrivstovuhølir til leigu



Vit byggja út, og hava 450 fermetrar av skrivstovuhølum til avlops, við útsýni yvir vøkru Hoydalar.

Áhugaði kunnu venda sær til Niels Christian Nolsøe á tlf. 31 45 05 ella e-mail: ncn@elektron.fo

P/F Elektron, Staravegur 9, 100 Tórshavn

ELEKTRON

STEPHANSSONS HÚS 31 4291



# ÚTSØLA

útsølan byrjar mánamorgunin 25. februar kl. 9.00





Leygardagin er stongt!

Pf. FÓTBÚNI

TRÓNDARGØTA 23 · TLF. 311705

EURO SKO EURO SKO

Sosialurin - 311820



# Laaaannngt vikuskifti í Aberdeen

hósdag til mánadag...ja!




Aberdeen hevur nógv at bjóða tær, bæði til gaman og álvara. Spáka tær ein túr eftir longu handilsgøtuni Union Street. Vitja tey ymisku søvnini og tað væl umtókta SATROSPHERE, sum er áhugavert fyri bæði børn og vaksin. Hugna tær við einum góðum bita á einari av teimum mongu frálíku matstovunum. Og gloym ikki at vitja pubbirnar við tí livandi tónleikinum.

Ja, Aberdeen hevur sanniliga nógv at bjóða.

**Íroknað er** flogferð, fýra nætur á dupultkamari við morgunmati og ferðaavgjøld.
Tilboðið er galdandi til 1. apríl.

Fráferð úr Vágum hósdag kl. 17.30.
Fráferð úr Aberdeen mánadag kl. 19.00.

Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo

SANSIR · TEL 355 355



# LANDSVERKFRØÐINGURIN

## Verkfrøðingur

**Ert tú áhugaður í nýggjum avbjóðingum á eini nýggjari deild í menning - Byggideildini hjá Landsverkfrøðinginum?**

**Byggideildin varðar av øllum almennum byggiarbeiðum - vegabygging, havnabygging og húsabygging - frá prosjekteringsbyrjan til avhending og garantisýn. Deildin varð stovnað fyri umleið einum ári síðani, og tann, ið verður settur, fer at luttaka í eini framhaldandi menning av deildini.**

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna eitt nú um:
- prosjektstýring
- byggileiðslu
- samskifti við stýrir, ráðgevar, arbeiðstakarar og aðrar áhugabólkar
- útbjóðing
- sáttmálar við ráðgevar og arbeiðstakarar
- prosjektgransking



**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir royndum byggiverkfrøðingi við góðum samstarvsevnum, sum hevur hug at fremja sínar hugsjónir í verki. Starvið er sera sjálvstøðugt. Royndir innan eitt ella fleiri av nevndu virkisøkjum gevur fyrimun, men er eingin treyt.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Verkfrøðingafelag. Arbeitt verður skiftistíð, og møguleikar eru fyri eftirútbúgving. Starvið verður sett skjótast til ber ella eftir nærri avtalu.



**Umsóknir**
Umsókn við lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda í brævbjálva merktur "verkfrøðingur til byggideildina", til

Landsverkfrøðingin
Postboks 78
110 Tórshavn

og skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 15. mars 2002.
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Kristiani Rasmussen á tel. 311333 (e-postur: kristian@lv.fo)

Tinghúsvegi 5 Postboks 78 FO-110 Tórshavn lv@lv.fo Tlf. +298 311333 Fax +298 314986




# Bíligari hjá føroyingum at ferðast á hjólum

**Landsstýrið fer nú at lækka avgjøldini á kampingvognum og kampingbussum**

FRÍTÍÐARLÍV
*Áki Bertholdsen*



*Nú fer tað at verða munandi bíligari hjá føroyingum at keypa sær kampingvogn ella kampingbuss,sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum. Hann er nú á veg í tingið við uppskotið um at lækka toll og avgjald á kampingvognum og kampingbussum.*

Nú skal tað vera bíligari hjá føroyingum at keypa kampingvogn ella kampingbuss. Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, arbeiðir í løtuni við einum uppskoti um at lækka avgjaldið á kampingvognum og kampingbussum, so at teir verða bíligari.

–Støðan er tann, at í Føroyum er nógv hægri avgjald á kampingvognum og kampingbussum, enn tað eru í grannalondum okkara, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

–Eitt nú verða kampingbussar tollaðir sum persónbilar.

Hann sigur, at í øðrum londum er onki avgjald á kampingvognum, sum verða krøktir upp í ein persónbil.

–Avleiðingin av føroysku avgjaldsreglunum, er, at hesi akfør eru so dýr at keypa í Føroyum, at tað snøgt sagt forðar fyri øllum handli, tí ongin hættar sær undir at keypa slíkt akfar.

–Karsten Hansen sigur, at ætlanin er nú at taka avgjaldið á kampingvognum av. Harafturat er ætlanin at kampingbussar ikki longur skulu tollast sum persónbilar, men sum vøruvognar .

–Ein kampingbussur kann ikki brúkast til annað enn kampingbuss - í besta føri kann hann brúkast til vøruvogn. Tí haldi eg, at tað er rætt at tolla hann hareftir og ikki sum persónbil.

Karsten Hansen sigur, at málið hevur verið til viðgerðar á Landsstýrisfundi og har er undirtøka fyri at leggja málið fram.

Tí fer hann nú at snikka uppskotini til og síðani verða tey løgd fyri tingið, og tað verður longu í næstum, at tað verður lagt fyri tingið.

Hann sigur, at hetta fer at føra við sær, at kampingvognar og kampingbussar verða munandi bíligari at keypa í Føroyum.

# Strika døgverðatíman

**Eisini Vágs Skúli ætlar at strika døgverðatíman**

VÁGUR
*Áki Bertholdsen*

Tað er blivið alsamt vanligari, at skúlar og arbeiðspláss strika døgverðatíman . Ístaðin fyri at fara heim í ein tíma til døgverða, er ein stuttur matarsteðgur á arbeiðsplássinum, ella á skúlanum, og ístaðin sleppa arbeiðsfólk og børn so til húsar eina løtu fyrr seinnapartin.

Nú ætlar eisini Vágs skúli at strika døgverðatíman.

Skúlastýrið í Vági hevur gjørt eina kanning og hon vísir, at ein meiriluti av foreldrunum eru fyri at taka døgverðatíman av.

Samstundis hevur skúlastýrið spurt kommununa um hon er sinnað at betala tann meirkostnað, sum hetta fer at bera í sær fyri skúlan, tí verður døgverðatímin avtikin, skulu eitt nú kuldaskáp og ruskbingjur, keypast til skúlan.

Á býráðsfundi mikukvøldið varð samtykt at kommunan skuldi átaka sær at keypa skúlanum kuldaskáp og annars at bera tær útreiðslur, ið avtøkan av døgverðatímanum fara at føra við sær.

Jógvan Krosslá, borgarstjóri í Vági, sigur, at býráðið hevur fingið upplýst, at teir allarflestu skúlarnir í landinum longu hava avtikið døgverðatíman og at tað bara eru tveir skúlar í øllum Føroyum, har børnini enn fara heim til døgverða og tað er skúlin í Vági og ein lítil bygdarskúli.

Hann sigur, at umboðini fyri Vágs Býráð í skúlastýrinum hava fyrr umrøtt spurningin um at taka døgverða tíman av.

–Skúlin er beint omanfyri Vágs Havn og tað er ferðsluruðuleiki á høvuðsvegnum niðanfyri skúlan í hvørjum døgverðatíma, tí samstundis sum skúlabørnini fara heim til døgverða, fer eisini arbeiðsfólkið á virkjunum niðri á havnarlagnum til døgverða, og tað førir nógva ferðslu við sær.

–At avtaka døgverðatíman í skúlanum er í í allarstørsta mun eisini ein spurningur um ferðslutrygdina hjá børnunum, sigur Jógvan Krosslá.

# Ongin vandi fyri vatninum í summar

**Vágs Býráð er í ferð við at leggja 3.600 metrar av vatnveiting fyri at tryggja fólki og ídnaði nóg mikið av reinum vatni, eisini tá ið turkur er. Arbeiðið verður liðugt um tríggjar mánaðir.**

*–Nú skuldi tað verið ein farin tíð, at vágbingar koma í vatnneyð, tá ið turkur er. Arbeiðið at tryggja vatnveitingina verður liðugt í mei mánað í ár*



VÁGUR
*Áki Bertholdsen*

Nú kunnu vágbingar altíð vera vísir í at hava nóg mikið av reinum vatni, eisini tá í turkur er.

Vágbingar hava annar verið hampiliga væl fyri við vatni, men viðhvørt, tá ið turkur liggur leingi, gongur vatnið undan. Seinasta dømi um hetta var tað tiltikna turra árið 2000, tá ið vatnneyð var nógvastaðni í langa tíð, eisini í Vági.

Fyri fólkið í kommununi er hetta irriterandi, men fyri vinnulívið er tað ótolandi, tí nú eru nógv virki í Vági, sum krevja sera stórar nøgdur av reinum vatni, ikki minst stóra laksavirkið hjá Hera Hjelm.

## Liðugt í mei

Men nú skuldi tann trupulleikin verið loystur endaliga.

Vágs Býráð hevur tikið upp samstarv við SEV um at fáa vatn úr Ryskivatni í Botnhaga, norðanfyri Vág.

SEV brúkar vatnið úr Ryskivatnið til elverkið í Botni, men nakað síðani gjørdi Vágs Býráð og SEV avtalu við SEV um eisini at fáa vatn úr Ryskivatni oman til Vágs.

Eftir avtaluni skal Vágs Kommuna sostatt fáa vatn úr Ryskivatni, tá ið vatngoymslurnar, sum annars eru í Vági, fara at tømast.

Síðani er Vágs kommuna farin undir arbeiðið at leggja ta 3,600 metra longu vatnveitingina úr brunnunum í Vági, niðan í Ryskivatn.

Samstundis verður savningarbrunnur gjørdur norðuri á Hálsinum, umframt at pumpur skulu setast upp við Ryskivatn.

Men samstundis skal SEV eisini byggja út.

Ætlanin er at veita vatn oman av røðini vestanfyri Hvannadal, omanfyri Vág, oman í Ryskivatn.

–Har eru stórar vatngoymslur, sum SEV ætlar at veita oman í brunnin og síðani í Ryskivatn fyri at fáa meiri vatn til elverkið

Tá ið vatnið í goymslunum í Vági fer at ganga undan, verður vatn veitt úr brunninum oman í goymslurnar í Vági.

Men gongur vatnið í brunninum undan, verður vatn pumpað úr Ryskivatni í brunnin.

## Liðugt í summar

Hetta er eitt arbeiði sum kostar umleið eina millión krónur. Og á býráðsfundi mikukvøldið samtykti Vágs Býráð at játta tær seinast 750.000 krónurnar til endamálið.

Jógvan Krosslá, býráðsformaður, sigur, at arbeiðið verður liðugt í mei.

–Tá skuldi kommunala vatnveitingin í Vági kunna nøkta tørvin hjá húsarhaldum og vinnulívi til reint vatn nógv ár fram, eisini tá ið turkur er, sigur hann.

# Vágs kommuna er við í umhvørvisskrivstovu

VÁGUR
*Áki Bertholdsen*

Vágs Kommuna hevur nú samtykt at betala sín part av tí landsumfatandi Lokal Agenda 21 skrivstovuni, sum skal setast á stovn.

Lokal Agenda 21, er ein skrivstova, sum skal fevna um alt landið og sum skal vegleiða og ráðgeva kommunum í sambandi við umhørvismál og tað er í sambandi við samtyktina á umhvørvisráðstevnu í Rio De Janeiro í 1992, at hon verður sett á stovn.

Ætlanin er, at hvør kommuna í landinum skal betala tað, sum svarar til 8,50 fyri hvørt fólk í kommununi og so betalir landið tað sama.

Á býráðsfundi mikukvøldið samtykti Vágs Býráð at vera við í ætlanini og at betala sín part av útreiðslunum. Fyri Vág merkir hetta eina útreiðslu upp á 12.000 krónur um árið.

Tá ið Tvøroyrar Kommuna fyri stuttum samtykti at vera við í ætlanini, var tað við teirri treyt, at skrivstovan skuldi ikki leggjast í Havnini. Hon skuldi helst liggja á Tvøroyri, men í ringasta føri onkra aðrastaðni úti um landið, annars vildi Tvøroyrar Býráð ikki vera við.

Slíkar treytir hevur Vágs Býráð ikki sett.

Tvørturímóti er tað viðmerkt í samtyktini hjá Vágs Býráð, at Vàgs Kommuna fer ikki at leggja seg út í, hvar í landinum skrivstovan skal vera.

–Men verður skrivstovan á skrivstovuni hjá Kommunusamskipan Føroya í Havn, soleiðis sum eitt uppskot er, tekur Vágs býráð undir við tí, sigur Jógvan Krosslá, borgarstjóri, sum eisini er formaður í Kommunusamskipanini.

Hann sigur, at talan er um eitt einasta arbeiðspláss. Í Føroyum eru 39 kommunur og verða tað fleiri kommunur, sum seta krav fram um at fáa hetta eina arbeiðsplássið, er tað tað sama sum at beina fyri ætlanini, heldur hann.